# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundi 29.04.2019*

**Bygdaráðsfundur 29.04.2019 kl. 18.00 til kl. 18.30**

| | | |
|---|---|---|
| **Fundarstað:** | **Fundarhøli** | |
| **Hjástødd**: | Jóhannus Danielsen | x |
| | Súni í Hjøllum | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Niclas Davidsen | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Kaj Eli Hansen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Selma Hansen. skrivari | x |

**Til viðgerðar:**

**Mál nr. 31/2019. Liðugtgerð umvæling av 81bygningi og stoyping av teknikrúmi - 2.viðgerð**
J.nr. 09.01.07-K09-1-16

**Málslýsing**

Fíggjarnevndin hevur staðfest ein meirkostnað, í mun til hvat er avsett til arbeiðið, í samband við umvæling av skúla og gerð av nýggjum teknikkrúmi til svimjihylin, uppá kr. 592.656. Talan er bæði um óvæntaðar útreiðslur og tilvæl, sum eru gjørd eftir, at tilboðið er góðkent.

Harumframt mælir skúlin til, at karmarnir innan í skúlastovunum verða málaðir, rampa til rørslutarnað verður gjørd uppá teknikkrúmið sunnanfyri skúlan.

Í 2018 vóru játtaðar kr. 3.500.000 til íløgu skúlin og svimjh., pr. dagsdato eru kr. 3.248.141 nýttar í 2018. Sostatt eru kr. 251.859 ikki nýttar av íløgujáttanini fyri 2018.

**Liðugtgerð umvæling av 81bygningi og stoyping teknikrúm:**

| | |
|---|---|
| Tilboðsarbeiði flutt frá 2018 til 2019 | kr. 377.095 |
| Mettur meirkostnaður sambært uppgerð | kr. 592.656 |
| Máling, rampa v.m. | kr. 70.500 |
| **Í alt** | **kr. 1.040.251** |
| Ónýtt játtan fyri 2018, at flyta til 2019 | kr. 251.859 |
| **Meirjáttan** | **kr. 788.392** |

Støða skal takast til meirjáttanina í 2019 uppá kr. 800.000.

**Tilmæli**

Á fundi 21.03.2019 mælir Fíggjarnevndin til, at kr. 251.859, ið ikki vóru nýttar í 2018, verða fluttar til 2019. Eisini mælir Fíggjarnevndin til, at kr. 800.000 verða játtaðar eyka til skúlan/svimjh. Peningurin verur tikin av tøkum peningi.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

Á fundi tann 23.04.19 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við aðru viðgerð av meirjáttan og flytan av peningi frá 2018 til 2019, í alt kr. 1.051.859.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 32/2019. Ársroknskapur 2018 – Skálafjarðar Sløkkilið**
J.nr. 14.00.00-Ø09-1-17
**Málslýsing**
Ársroknskapurin fyri 2018 hjá Skálafjarðar Sløkkiliði er komin til ummælis hjá Nes kommunu.

**Tilmæli**
Á fundi 23.04.2019 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við ársroknskapinum fyri 2018, soleiðis sum hann er uppsettur.

**Avgerð**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini var einmælt samtykt.

**Mál nr. 33/2019. Innliman av Tórshavnar kommunu í IRF**
J.nr. 00.17.15-P20-1-19
**Málslýsing**
Í meiri enn 1 ár hava IRF og KB (kommunala brennistøðin hjá Tórshavnar kommunu) havt samráðingar um, at KB kemur uppí IRF soleiðis, at tað í framtíðini bert verður 1 renovatiónsfelagsskapur fyri allar Føroyar.

Í mars 2019 hava nevnd og stjórn verið runt í Føroyum og greitt lutaeigarunum frá ætlanini at innlima Tórshavnar kommunu i IRF.

Nevnd og stjórn í IRF mæla til, at Tórshavnar kommuna gerst limur í IRF.

**Tilmælir**
Á fundi 16.04.2019 tekur Tekniska nevnd undir við tilmælinum frá IRF.

Á fundi 23.04.2019 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd.

Eftirfylgjandi er broyting komin frá IRF, sum er løgd fyri bygdaráðið.

**Avgerð**
Tilmælini frá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini, vóru einmælt samtykt við tí broyting, sum er komin eftirfylgjandi.

**Mál nr. 34/2019. Loyvi til umvæling av sethúsum**
J.nr. 02.34.02-P20-21-19
**Málslýsing**
Tann 14. mars 2019 søkir Hans Erik Jensen um loyvi til at umvæla sethúsini.

Talan er um eina høvuðsumvæling. Einasta broytingin á skapinum verður, at ein sama slag kvistur, sum verandi vestureftir, eisini verður bygdur eystureftir.

**Tilmæli**
Á fundi 16.04.2019 mælir Tekniska nevnd til, at geva loyvi sambært innsendu skjølum.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 35/2019. Umsókn um byggiloyvi til útbygning**
J.nr. 02.34.02-P20-20-17
**Málslýsing**
Tann 8. apríl 2019 søkir Borgar Hansen um loyvi til at víðka um sethúsini. Ætlanin er at byggja ein útbygning, miðskeiðis á húsinum, vestureftir.

**Tilmæli**
Á fundi 16.04.2019 mælir Tekniska nevnd til, at geva loyvi sambært viðløgdu skjølum.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 36/2019. Umsókn um byggiloyvi til uppíbygning**
J.nr. 02.34.02-P20-2-15
**Málslýsing**
Tann 28. mars 2019 søkir Jan Joensen um loyvi til at byggja uppí sethúsini eystureftir. Útbyggingin skal nýtast til goymslu.

**Tilmæli**
Á fundi 16.04.2019 mælir Tekniska nevnd til, at geva loyvi sambært viðløgdu skjølum.

**Avgerð**
Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.

**Mál nr. 37/2019 Leigisáttmáli – lukkað mál**
J.nr. 08.03.00-G01-2-17

**Mál nr. 38/2019 Fíggjarætlan 2020 - Bókasavnið í Nes kommunu**
J.nr.21.00.00 – Ø09-1-19
Fíggjarætlanin fyri 2020, hjá Bókasavninum í Nes kommunu, er komin til ummælis.

**Tilmælir**
Á fundi tann 16.04.2019 mælir Mentanarnevndin til at taka undir við fíggjarætlanini fyri 2020 soleiðis, sum hon er uppsett.

Á fundi tann 23.04.2019 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini.

**Avgerð**
Tilmælini frá Mentanarnevndini og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.

**Kunning:**

1. **Kvartal av roknskapinum hjá Nes kommunu 2019**

| **Rakstur** | **1.kv.** | **Fíggjarætl.** | **Munur** | **%** |
|---|---|---|---|---|
| §1 Kommunal fyristingar | 1.145.444 | 4.788.000 | 3.642.556 | 76,1% |
| §2 Almanna- og heilsumál | 4.170.578 | 16.686.000 | 12.515.422 | 75,0% |
| §3 Børn og ung | 2.666.545 | 11.215.000 | 8.548.455 | 76,2% |
| §4 Undirvísing | 974.125 | 3.890.000 | 2.915.875 | 75,0% |
| §5 Mentan og frítíð | 1.098.084 | 3.795.000 | 2.696.916 | 71,0% |
| §6 Teknisk mál | 1.047.130 | 4.402.000 | 3.354.870 | 76,2% |
| §7 Kommunal virki | 958.154 | 3.092.000 | 2.133.846 | 69,0% |
| **Rakstur í alt** | **12.060.060** | **47.868.000** | **35.807.940** | **74,8%** |
| §20 Inntøkur v.m. | -15.243.488 | -54.642.000 | -39.398.512 | 72,1% |
| **Rakstur pr. 31.03.2019** | **-3.183.428** | **-6.774.000** | **-3.590.572** | **53,0%** |

| | **1.kv.** | **Fíggjarætl.** | **Munur** | **%** |
|---|---|---|---|---|

# *Samandráttur av almenna bygdaráðsfundi 29.04.2019*

| **Íløgur** | | | | |
|---|---|---|---|---|
| §2 Almanna- og heilsumál | 0 | 141.000 | 141.000 | 100,0% |
| §3 Børn og ung | 203.497 | 5.000.000 | 4.796.503 | 95,9% |
| §4 Undirvísing | 1.032.486 | 1.101.859 | 69.373 | 6,3% |
| §5 Mentan og frítíð | 684.215 | 1.800.000 | 1.115.785 | 62,0% |
| §6 Teknisk mál | 788.316 | 5.700.000 | 4.911.684 | 86,2% |
| §7 Kommunal virki | 792.441 | 9.030.000 | 8.237.559 | 91,2% |
| **Íløgur í alt** | **3.500.955** | **22.772.859** | **19.271.904** | **84,6%** |
| | | | | |
| **Íløgur og rakstur í alt** | **317.527** | **15.998.859** | **15.681.332** | **98,0%** |